# Svínoy á markinum

**Regin Justinussen er IRF maður, kongsbóndi og avgreiðslumaður fyri Strandferðsluna í Svínoy. Hann heldur, at Svínoyar bygd liggur á markinum, tá hugsað verður um bygdini er lívi lagað**



*Regin Justinussen er ikki bjartskygdur um framtíðina hjá Svínoyar bygd*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

SAMRØÐA
*Solby A. Eliasen*

**Svínoy:**
Tá Sosialurin kemur framvið hjá Regini, er maðurin ikki at síggja nakrastaðni. Inni í kjallaranum kennist lukturin av seyði og fletting. Á frystiboksunum, sum ikki eru færri enn tríggjar í tali, liggja nýrir, fótamørar, nakrir fyltir sperlar og aðrir innvølir av seyði, umframt, at eini 20 krov hanga uppi. Men ongin maður er at síggja. Fara útaftur, og tá kemur Regin við trillubøru gangandi eftir vegnum.

– Nú, tit funnu vegin fram, sigur hann og smílist. Hann greiðir frá, at hann og ein annar flettu 20 lomb kvøldið fyri, og at hann nú rokast við upptaki. Men hann gevur sær kortini tíð til at práta við okkum um leyst og fast.

Tá prátið fellur inn á bygdina og bygdarlívi, er Regin ikki so bjartskygdur. Hann heldur, at Svínoy liggur á markinum, tá tað kemur til trivnaðin í bygdini. Tí hóast nógv er hent í bygdini seinastu tíðina, so letur tað ikki til, at nøkur varandi loysn er í eygsjón, tá hugsað verður um bygdini skal verða lívi laga.

Um ikki ein familja við sjey børnun flutti út á oynna fyrr í summar, so hevði bert tað eina skúlabarni verið í bygdini. Og tað er Regin ikki í iva um, er tekin um, at tað gongur bara tann eina vegin.

Men hann fegnast um, at ein familja er komin at búgva har.

– Summi hava kanska hildið tey vera púra ør at flyta higar við sjey børnum úr Havn, men eg síggi soleiðis upp á tað, at hví skula tey ikki kunna klára tað, sum vit onnur?

Hann heldur, at tað er sera hugnaligt at síggja børn spæla úti aftur í bygdini, og tað sást eisini væl aftur í kirkjuni, at níggju fólk eru komin afturat.

– Tað skapar lív í bygdina, ongin ivi um tað. Og haraftur at hava vit fingið tveir raskar fjallmenn aftur at, sigur hann, og her hugsar hann um teir báðar elstu dreingirnir, sum hava verið við á fjalli fleiri ferðir, síðani familjan flutti út.

Men Regin sigur eisini, at tey hava verið sera heppin í veðrinum hesa tíðina, tey hava verið á oynni. Summarið er farið aftur um fyri kortum og fyri framman liggur ein sera drúgvur vetur.

– Vetrarnir her kunnu vera beiskir at koma í gjøgnum. Serliga um hann legst við landsynningi, tá regnar nógv og eisini er nógvur vindur tá, greiðir Regin frá, men hann leggur tó afturat, at tað tykist sum familjan er greið yvir, at tað fara at koma langir dagar, sum ikki verða teir lættastu at koma ígjøgnum.

Hann heldur, at hendan familjan óivað fer at fáa nógv positivt burtur úr av at búgva á eini útoyggj í eitt tíðarskeið.

### Ferðasambandið

Tað er sum sagt strandfaraskipið Másin, sum siglir til Svínoyar og Fugloyar.

Men ferðasambandið er so sum so, heldur Regin. Hann siglir einaferð um dagin uttan mikudag, tá siglir hann tvær ferðir, so tað ber bert til at sleppa av oynni og til hús aftur sama dag, ein dag um vikuna. Og hesa ársins tíð er veðrið ofta sera illfýsið, og tá kemur tað meira enn so fyri, at Másin ikki sleppur at í Svínoy.

Tað eru tvær lendingar á Svínoynni – ein hvørjumegin – og um tað ikki hevði verið, so var illa statt. Hendan dagin, Sosialurin var á oynni, varð lagt at á Víkini, tí ov nógv brim var á Eiðini.

Regin greiðir frá, at postur kemur til oynna fimm dagar um vikuna, og tað er ikki so galið. Men tað merkir so eisini tað, at svínoyingar sum øll onnur, sum búgva á teimum smærri útoyggjunum ikki fáa leygardagsbløðini fyrr enn mánadag.

### Trý størv

Við ikki færri enn trimum størvum verður Regin mettur sum ein álitismaður í bygdini. Umframt at vera bóndi, tekur hann sær eisini av húsarhaldsburturkastinum og so er hann avgreiðslumaður hjá Strandferðsluni. Svínoyingar halda nógv av hesum manninum, sum er týdningarmikil fyri bygdina.

– Ein má vera sera eldhugaður og rættiliga brenna fyri tí, tá ein fæst við seyð, heldur hann, tí tað er altíð nóg mikið at takast við.

Regin, sum hevur fýra merkur og 120 áseyðir, heldur, at seyðurin hevur verið javnt góður í ár. Ongin framúr góður, men heldur ongin hinvegin.

Hagin hjá Regini gongur frá Høvdanum og heim í bygdina. Tað er ein rættiliga brattur hagapartur. Tað hugsar ein um, tá ein kemur siglandi framvið Svínoyar landinum við Másanum inn á Víkina.

Regin savnar alt burturkastið frá húsarhaldunum í bygdini og syrgir fyri, at tað verður flutt av oynni við Másanum til Hvannasunds. Tað verður so avheintað sama dag, sum burturkastið á Viðareiði.

Sum avgreiðslumaður hjá Strandferðsluni er tað hansara uppgáva at verða til staðar, tá Másin kemur við vøru og øðrum til bygdina. So koyrir hann tað runt til tey ymisku støðini í bygdini. Og um Másin broytir ferðaætlanina, so veit Regin tað altíð, og hann boðar so frá hesum í bygdini.

Regin er føddur og uppvaksin í Svínoy, men hann hevur búð í Havn í 10 ár. Hann flutti so aftur til Svínoyar, sum 25 ára gamal og hevur búð har síðani.

Tað búgva gott 60 fólk í kommununi, men longu vetrarnar eru helst bert eini 40 fólk í bygdini.

Tað er sera hugnaligt at standa soleiðis og práta um leyst og fast í kjallaranum hjá Regini, men hann má sleppa at gera seg lidnan við upptakið, og vit hava eisini onnur ørindi í bygdini, so vit takka fyri og fara út aftur í vetrarluftina, sum angar av heystinum.



*Regin er bóndi, og hann heldur, at seyðurin er javnt góður í ár. Ongin framúr góður og heldur ikki hinvegin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



# MBM fyllir fjórðingsøld

**Í dag, 25. oktober, eru 25. ár liðin síðani Meginfelag Búnaðarmanna varð sett á stovn. Felagið hevur seinastu árini bara ment seg, og í dag hevur felagið fleiri ymiskar deildir**



*Myndatxt: Fyrrapartin í gjár varð høvuðsreingerðing á skránni hjá starvsfólkunum á MBM. Gjørt varð reint til móttøkuna, sum verður í dag frá klokkan 15 – 18*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

FØÐINGARDAGUR
*Ingrid Bjarnastein*

MBM er eitt lutafelag, sum varð sett á stovn fyri 25 árum síðani undir navninum Mjólkarvirkið Búnaðarmanna, men navnið varð skjótt broytt til Meginfelag Búnaðarmanna, stytt MBM.

Eirikur Thorvaldsson, stjóri á MBM, sigur, at felagið hevur seinastu árini bara ment seg.

– Vit byrjaði fyri 25 árum síðani, og føðingardagurin í dag er ein markering av stovningardegnum. Fyrsta árið varð brúkt til felagsligar fyrireikingar. Eg kom til í 1978, og tað árið var mest brúkt til praktiskar upplýsingar. Sjálvt mjólkarvirkið fór ikki í gongd fyrr enn í apríl 1980, tí øll byggingin fór fram í 1979, greiðir Eirikur Thorvaldsson frá.

Skjótt vísti tað seg, at serliga bóndir vantaðu útgerð, bæði maskinur og fóður, og var tað tá MBM fór undir fóðurdeildina.

### Mjólkarvirkið

Sosialurin var fyrrapartin hósdagin ein túr uppi á meiarínum – Mjólkarvirkinum. Alt virksemið lá henda morgunin stilt, av tí at vaskað varð til stóru móttøkuna sum verður í dag. Har uppi hittu vit virkisleiðaran, Øyvind Hentze.

– Vit hava lagt stilt í dag til gestirnir koma til móttøku í morgin, so her er høvuðsreingerðing á skránni, sigur Øyvind Hentze, meðan hann stendur við eini slangu og sproytar skúm við lúti, klori og øllum møguligum øðrum upp eftir gólv og veggum.

– Alt verður lagt stilt í dag, og so fara vit í gongd aftur í nátt at framleiða. Tað ber ikki so væl til at gera reint og framleiða í senn.

Leiðin gekk so inn í kuldarúmið. Her sóu vit eitt hav av mjólkapakkum. Hetta var mjólkin, sum er send út til teir ymsu handlarnar í morgun.

– Fríggjadag senda vit mest mjólk út. Tá er talan um millum 40.000 og 50.000 litrar av mjólk. Hinar dagarnar er tað ymiskt, tí mánadag, mikudag og fríggjadag senda vit mjólk út til allar bygdirnar, greiðir Øyvind Hentze frá, sum sigur, at Havnin fær mjólk allar dagar um vikuna.

Man kann næstan kalla tað »vektvogtara-tíð« í Føroyum, men hetta sært tú ikki aftur uppi á Mjólkarvirkinum. 18.000 pakkar av róma verða seldir um vikuna, og eisini súrróma verður selt nógv av.

– Súrrómin er vaksin nógv seinastu árini. Nú selja vit eini 8000 bikar av súrróma um vikuna, sigur Øyvind Hentze.

Lættimjólkin sum kom á marknaðin fyri ikki so heilt langari tíð síðani, hevur eisini ment seg. 20.000 litrar av lættimjólk verða seldir um vikuna. Men Øyvind Hentze sigur, at tað er rættiliga ymiskt, hvussu nógv selt verður. Tað merkist væl aftur á søluni nær fólk fáa løn og nær mánaðarlønin kanska er við at vera uppi.

– Í jólavikuni verða um 100.000 pakkar av róma seldir. Hetta eru meira enn tveir pakkar til hvønn føroying, og tað er rættiliga nógv.

AB-mjólkin, sum kom á marknaðin fyri nøkrum árum síðani, hevur nú lagt seg í eina legu. Øyvind Hentze sigur, at í byrjanini var eitt stórt upplop við søluni av AB-mjólk, men nú hevur henda sølan stabiliserað seg, og lagt seg í eina meira ella minni fasta legu.

– Annars høvdu vit ætlanir um at verða ISO 9000 certifiseraðir til føðingardagin, men tað hevur tíverri ikki eydnast okkum, sigur virkisleiðarin.

– Men einaferð í næsta mánað verða vit skoðaðir, og vit vænta, at tað verður í hesum árinum.

ISO 9000 er eitt slag av góðskustýring. Arbeitt verður alla tíðina við at betra um góðskuna av vøruni, og kann ein eisini siga, at tað er ein trygd hjá keyparunum at vita, at virkið er ISO 9000 certifiserað.

Annars verður føðingardagurin hjá MBM hildin við móttøku í dag frá 15 – 18 uppi á Mjólkarvirkinum. Leygardagin verður veitsla fyri fyri bóndunum og starvsfólki umframt nøkrum innbodnum gestum.

Sosialurin ynskir MBM hjartaliga tillukku við føðingardegnum.



*Fríggjadagar sendir Mjólkarvirkið millum 40.000 og 50.000 litrar av mjólk út kring alt landið. Øyvind Hentze, virkisleiðari, sigur, at fríggjadagurin er tann dagurin nógv mest av mjólk verður send út*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Operatión Dagsverk

**Seinastu árini hevur Operatión Dagsverk verið á skránni hjá miðnámsskúlnum í Føroyum. Ein dag um árið fara miðnámsskúlanæmingar út at arbeiða, og pengarnir verða síðani givnir til eitthvørt vælgerandi endamál**

OPERATIÓN DAGSVERK
*Ingrid Bjarnastein*

6. november er settur sum Operatión Dagsverk dagur í ár. Henda dagin fara næmingar á miðnámsskúlum í Føroyum út at arbeiða ístaðin fyri at fara í skúla, og peningurin, ið teir fáa afturfyri fer til eitt vælgerandi endamál.

Operatión Dagsverk er ein óheftur hjálparfelagsskapur, ið studentar hava tikið stig til og stýra. Fólkini í O.D. arbeiða sjálvboðið, og miðað verður ímóti, at mest møguligt av innsavnaða peninginum fer til sjálva verkætlanina.

Endamálið við Operatión Dagsverk er at veit neyðstøddum børnum møguleika fyri útbúgving, soleiðis at tey sjálvi læra at stríðast fyri rættindun sínum og soleiðis megna at betra um livikorini.

– Í ár fer peningurin til børn hjá fyrrverandi ognartrælum í Nepal. Trælirnir vóru leysgivnir fyri tveimum árum síðani, men frælsið hevur ikki ført betri livikor við sær, siga fyri-reikararnir í tíðindaskrivi.

Fyrireikararnir vilja gera vart við, at um fólk hava okkurt arbeiðið at bjóða næmingunum, so eru tey vælkomin til at siga frá.